Tíðindabræv 15/2013 – Rakstur

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Oktober, 2013

## YVIRLIT YVIR SERTIFIKAT OG SKJØL, IÐ SKULU VERA TØK UMBORÐ Á SKIPUM

Hjálagt senda vit IMO skriv FAL.2/Circ.127 / MECP.1/Circ.817 / MSC.1/Circ.1462.

Skrivið, ið er frá øllum trimum IMO-nevndunum, FAL, MEPC og MSC, gevur dagført yvirlit yvir sertifikat og skjøl, sum skulu vera tøk um borð á skipum í 2013.

Gevið gætur, at skrivið er gjørt i samsvari við ásetingar í FAL-sáttmálanum (stykki 2) og, at yvirlitið fevnir um skjøl, har

- *"krøv eru sett í gildi av almennum myndugleikum til skipaeigarar, at hesi skjøl eru tøk, tá ið skip kemur í havn, meðan tað liggur og tá ið tað siglir avstað aftur"*.

Gevið eisini gætur, at skrivið fevnir einans um sertifikat og skjøl, hvørs ásetingar stava frá IMO millumtjóða sáttmálunum.  So statt fevnir yvirlitið ikki um skjøl, sum verða kravd av øðrum altjóða felagsskapum og av landsins myndugleikum hjá hvørjum skipi.

Kortini, við støðugt strangari PSC-eftirlitunum í alt fleiri havnum skal Sjóvinnustýrið við hesum nýta høvið til at heita á skiparar og fólk, ið varða av rakstrinum av skipum undir FAS at fara um savnið av sertifikatum og kravdum skjølum umborð við hjálagda yvirlitinum fyri hond, til tess at tryggja, at viðurskiftini eru í lagi.  Har funnið verður at skjøl mangla, skal tann, ið hevur ábyrgd sjálvandi gera tað sum neyðugt er, til tess at fáa bøtt um støðuna, og møguliga venda sær til myndugleikan fyri at rætta feilin skjótast til ber.

Hjálagt  FAL.2/Circ.127 / MECP.1/Circ.817 / MSC.1/Circ.1462

--- 000 ---